Nógv nýtt heimkomið

m.a. summarjakkar við og uttan hettu frá kr. 868,-

Nýtt frá Kello og Choice

Buksur og troyggjur í hópatali
T-shirts frá kr. 108,-

Vøkur sett frá Lady G

Vælkomin inn á gólvið
Skálabúðin

Langur Leygardagur



Tilboð
Polynosic skjúrtur
1 fyri kr 240,-
2 fyri kr 400,-

P/F hjá KISSA
Tórsgota • 100 Tórshavn • Tel. 31 13 95

HALDIÐ SOSIALIN

400,- um ársfjórðingin
- sparið 380,- í mun til leysasølu

600,- kr. um ársfjórðingin í Danmark
(500,- kr. fyri 1 ferð um vikuna - 5 bløð)

Sosialurin
ARGJAVEGUR 26 · POSTSMOGA 76 · 110-TÓRSHAVN · TEL 341800 · FAX 341801
POST@SOSIALURIN.FO · WWW.SOSIALURIN.FO

Undirritaði teknar seg sum haldara av Sosialinum, og fær blaðið 5 ferðir um vikuna.

Ókeypis
Verður sent ópostað Sosialurin rindar postgjaldið

64

Navn: _____
Bústaður: _____
Postnr.: _____
Bygd/býur: _____
Telefon nr.: _____
Undirskrift: _____

Sosialurin
Postsmoga 76
110 Tórshavn

Hetta vikuskiftið alt Menu minus 20%

Sp/f Valdemar Lützen
Vágsbotn · Boks 20 · 110 Tórshavn
Tel 31 16 75 · Fax 32 19 04

Eldur í býbussi

Um sjeytíðina hósmorgunin kom eldur í ein av býbussunum í Havn, meðan hann var í leið. Talan er um ein gamlan býbus, sum koyrir við undantaksloyvi

BUSSLEIÐIN

Jón Brian Hvidtfeldt
jonbrian@sosialurin.fo

Eldur kom í ein býbus í Havn umleið klokkan sjey hósmorgunin. Bussurin koyrdi út eftir Velbastaðvegnum á veg út á Norðasta Horn, tá eldur kom í.

Ein hýruvognsførari, ið koyrdi aftanfyri varnaðist, at bæði eldur og roykur kom undan bussinum, og fekk boðað bussføraranum frá. Men tá hevði hann helst varnast nógva roykin.

Tómur bussur

Eingi ferðafólk vóru við bussinum á veg út á Norðasta Horn hósmorgunin, og hendingin spældi væl av.

Men ilt er at meta um, hvat kundi hent, um bussurin var fullur av ferðafólki í morgunferðsluni í miðbýnum í Havn.

Enn er ikki greitt, hvør orsøkin var til at eldur kom í bussin. Tað skulu kanningar hjá Bileftirlitinum vísa.

Gamal bussur

Bussurin, ið eldur kom í hósmorgunin, er rættuliga gamal. Mouritsens Bussar, ið eigur bussin, hevur ikki hug at upplýsa aldurin á honum, men sum Sosialurin skilir, er bussurin væl eldri enn tey 12 árini, ið ein bussur í mesta lagi má vera sambært útbjóðingartilfarinum.

Sjúrður Olsen, formaður í Teknisku nevnd hjá Tórshavnar Kommunu, sigur at býráðið í fjør summar gjørdi eina avtalu við Mouritsens Bussar, ið gevur teimum loyvi til at nýta henda gamla bussin, til ein nýggjur kemur.

Tá fyritøkan vann útbjóðingina av Bussleiðini var ein av treytunum, at hon skuldi yvirtaka verandi býbussar. Men tann eini av bussunum, ein nýggjur Scania, riggaði sera illa, og tí varð hesin sendur av aftur landinum, meðan ein annar varð bílagdur.

Sjúrður Olsen greiðir frá, at Tórshavnar Kommuna í fjør summar fekk at vita, at nýggi bussurin kundi latast um heystið. Og til hesin kom valdi kommunan at loyva Mouritsens Bussum at nýta gamla bussin.

Sjúrður Olsen sigur, at sum hann hevur skilt tað, so kemur nýggi býbussurin síðst í hesum mánaðinum.

Um sjeytíðina í morgun kom eldur í býbussin, sum var á veg út á Norðasta Horn

Virðismetið arbeiðið hjá Handilsskúlanum

UNGT VIRKI

– Vit sleppa ikki undan, at tað er sveiggj í búskapinum, og nú vit eru í eini ávísari afturgongd, duga vit betur at virðismeta arbeiðið hjá Handilsskúlanum við generelt at birta uppundir virkishugin hjá teimum ungu, og harímillum eisini hetta tiltakið ungt virki segði Bjarni Djurholm, landsstýrismaður tá hann setti tiltakið "UngtVirki" í SMS í gjár.

– Hann vísti á, segði landsstýrismaðurin, at tá umboð fyri skúlar í Føroyum hava luttikið í slíkum tiltøkum (European Business Game), hava teir so avgjørt ikki smæst burtur, tvørturímóti er tað undrunarvert, hvussu væl teir hava klárað seg, og hava bæði bólkarnir og skúlarnir, teir komu frá, rós uppiborið. Og hann helt fram:

– Hetta vísir, at tilfarið, skúlarnir hava at arbeiða við, og skúlarnir sjálvir kunnu kappast við hvønn tað skal vera.

Tað verður so upp til tey, sum skulu skapa karmarnar, at teir eru so, at tað er áhugavert og lagaligt at seta virksemi í gongd og reka virksemi í Føroyum.

Fremst liggur hendan ábyrgdin á valdu politikarunum, men eisini á stovnunum sum hava við vinnuna at gera, á skúlum, fíggingarstovnum o.s.fr.

Bjarni Djurholm, landsstýrismaður setir Ungt virki 2004 í SMS

Mynd Alavur Haraldsen

Bjarni Djurholm segði, at verandi samgonga hevur sett sær sum mál at hava ein vinnupolitikk, ið skapar eitt fjølbroytt og dynamiskt vinnulív. Vit skulu stimbra vinnulívið at klekja haldgóð hugskot um nýggjar vinnumøguleikar.

Fortreytirnar fyri hesum verða m.a. skaptar gjøgnum:

- gransking og menning, t.d. innan KT, gen- og biotøkni
- íløgur
- ígongdsetarar og kveikjarar
- førleikamenning av arbeiðsmegini
- best møguliga marknaðaratgongd

Fyri at koma aftur til ungt virki, so má sigast at hugskotini eru fjølbroytt, júst soleiðis sum vit ynskja føroyska vinnu at vera, nevniliga at hon skal hava nógv bein at standa á, so hetta tiltakið boðar frá góðum.

Landsstýrismaðurin ynskti við hesum spírandi ígongdsetarunum góða eydnu við teirra tiltøkum og Handilsskúlanum alt tað besta framyvir.

Tiltakið var í SMS allan hósdagin. Vinarin varð kosin seint í gjár. Hans Mortensen, stjóri kunngjørdi navnið á vinnara og Reidar Nónfjall, stjóri handaði virðislønína frá Føroya Handilsskúla til besta virkið.

Enekk á Norðurbryggjuni

TÍÐINDASKRIV

Leygarkvøldið 27. mars spælir nýskapandi bólkurin Enekk á Norðurbryggjuni í Keypmannahavn. Koncertin er ein í røðini á eini konsertferðini til Finnland og Áland.

Við á ferðini eru Kári Sverrisson, gittar, Óli Olsen, klaver, Rógvi á Rógvu, trummur, og Heðin Z. Davidsen, elgittar. Bólkurin hevur verið til síðani 1991, við skiftandi manning. Umframt fløgurnar "Andlit hins Tigandi" (1993), "Ver sterk mín sál" (1994) og "Fýra nætur fyri jól" (1997) hevur bólkurin júst útgivið fløguna "Meðan vit nærkast jørðini", og tað verður m.a. nakað av hesum nýggja tónleikinum, ið verður at hoyra á konsertini á Norðurbryggjuni.

Tónleikurin er ein blandingur av fólka- jazz- og rocktónleiki. Kári Sverrisson hevur skrivað stórsta partin av tekstunum, sum allir eru á føroyskum, men Enekk framførir eisini yrkingar eftir øðrum yrkjarum sum t.d. F. García Lorca, Arseniy Tarkovsky og Snorri Hjartarson allir í føroyskari týðing. Bólkurin er kendur fyri at velta gamalt føroyskt tilfar sum kvæði, vísur, skjaldur og kingosálmar upp úr nýggjum, og tað er ofta hetta tilfar, ið verður spælt til koncertir.

Atgongumerki á 80 kr. kunnu bíleggjast á telefon: 3283 3702 ella á alnótini: bryggen@bryggen.dk

Fleiri upplýsingar um Norðurbryggjuna eru at finna á heimasíðuni: www.bryggen.dk.